


# Esbern Müller gjørdist bert 13 ára gamal

**Müllerfólkið eigur eina serliga deild í gamla kirkjugarði. Hon er nakað niðanfrá høvuðsinngongdini og kloss móti Dalavegnum. Hetta er ein sera spennandi ætt, sum vit seinni fara at hoyra enn meira um. Hesa ferð er tað um nøkur av børnunum í ættini og um nakrar ævintýrarar, sum ættin eisini hevur fostrað**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Teir tríggir gravsteinarnir, sum er avmyndaðir í hesi grein, eru allir á gravum hjá børnum hjá Margrethu og Søren Emil Müller.

Edvard Mitens gekk í realskúla saman við Esbern, sum doyði 13 ára gamal. Hann gevur í eini av sínum bókum eina stutta lýsing av, hvussu syrgiligt hetta var. Hann doyði vist av nøkrum so einfaldum sum blindtarmsbruna.

Mitens nevnir eisini jarðarferðina, har nógvir av kammeratunum frá realskúlanum luttóku.

Um systrarnar, sum liggja undir liðuni á honum, er ikki nógv at siga. Tær gjørdust bert eitt ára gamlar og doyðu ár um ár. Tann yngra kallaðist Sigrid Margrethe. Søren Müller hevði ein systir, sum kallaðist Sigrid, og sum doyði um aldarskiftið. Hon var gift við einum skógriddara í Danmark og doyði frá nógvum børnum. Maður hennara giftist skjótt aftur. Kona Søren Müller æt Margrethe, so gentan er helst uppkallað eftir teimum báðum.

Eldra gentan kallaðist Kristine Elisabeth. Mamma Margrethu Müller kallaðist Elisabeth og mamma Søren æt Maren Christine. So hon kann hava verið uppkallað eftir teimum báðum ommunum.

Børnini hjá Margrethu og Søren Emil vóru annars hesi:

**Hans Christoffer** (1888-1925). Hann var giftur við Ebbu f. Zahle 1891-1967. Ebba var reiðari á Nólsoy, sum gekk burtur í 1934, soleiðis sum greitt verður frá í Miðvikuni fyri tíðina. Tey eru bæði grivin í gamla kirkjugarði, og greitt fer at verða frá teimum í eini seinni grein í hesi røð.

**Margretha Christina Elisabeth** f. 1896. Hon er fødd beint eftir, at hennara smáu systrar eru deyðar, og hon er helst uppkallað eftir teimum. Hon giftist við Johan Danielsen, sum var sonur C.C. Danielsen, sum fyrr er umrøddur í hesi røð. Hjá teimum er eingir eftirkomarar.

**Poul** giftist við Sunnevu Hentze úr Skúvoy. Ein abbadóttir teirra er Ann Britt Müller, sum er sera ættaráhugað, og sum eisini er ein kelda til hesa grein. Sigast kann, at vit bæði royna í felag at finna so nógv fram sum gjørligt um Müllerættina, og fer hetta at koma fram seinni.

Stutt kann sigast um systkini hjá Søren Müller, at tveir synir og ein versonur komu at vera kolonibestýrarar í Grønlandi seinast í 1800 talinum. Talan er um brøðurnar Rasmus og Poul og versonin Johan Joensen, vanliga kallaður Grønlands Johan, sum giftist við Amaliu, systir teir báðar. Tað er áhugavert skjalatilfar komið úr Grønlandi, sum lýsir viðurskifti bæði hjá ættini í Grønlandi og í Føroyum.

Ein beiggi, Hans Christian f. 1868, fór til Amerika, og eingin hevur vitað nakað um hann. Í hesum brævasavni er eisini "lívstekin" frá honum.



ESBERN MICHAEL MÜLLER
F. 2. AUGUST 1890
D. 3. APRIL 1904
--
KRISTINE ELSEBETH MÜLLER
F. 8. MAI 1892
D. 24. JANUAR 1894
---
SIGRID MARGRETHE MÜLLER
F. 5. OKTOBER 1893
D. 27.APRIL 1895



*Drongurin t.v. er ókendur, síðan eru tað Hans C. og beiggi hansara Esbern. Um nakar kennir tann ókenda drongin vilja vit fegin frætta*



*Ludvig Müller var ein ævintýrari*



*Kaparin Michael Müller. Kanska er Esbern við sínum millumnavni uppkallaður eftir honum*

## Ludvig Müller leitaði eftir gulli í Australia

Ein beiggi gamla sýslumannin H.C. Müller, fyrr umrøddur í hesi røð, var Christian Ludvig Müller, f. 1826, búsettur í Kvívík. Dimmalætting hevði í 1927 hendan stubban, sum er endurtøka av grein, sum hevði staðið í donskum blaði 20 ár frammanundan:

Man ser i disse Dage i Københavns Gader en gammel Færing, der spaserer rundt i den Dragt, man til daglig bruger paa Færøerne, nemlig korte Benklæder og blaastribet Hue, hvilken Hovedbeklædning bæres af de ældre Mænd i modsætning til de yngre, der bruger Huen rødstribet.

Manden er den mellem Landsmænd bekendte Ludvig Müller fra Kvivig. Han er 82 Aar, og er, som han selv siger kommen for at tage afsked med Danmark.

Det er henved 60 Aar siden, han var her sidst. Da var han én af de tyve Færinger, der med hæder deltog i Krigen i 1848. (Hetta var kríggj millum Týskland og Danmark, sum Danmark vann.) Siden stod hans Hu – efter at have opholdt sig her i seks Aar – at komme længere ud i verden.

Sammen med nogle ligesindede rejste han derfra til Australien paa en eventyrlig Guldgraverfærd. Efter nogle Aars forløb tvang Klimaet ham imidlertid til at vende hjem igen, men han bevarer endnu en lille raa Guldklump til Erindring om Færden.

Og nu maatte han ud igen for at se "Verden" for sidste Gang.

København har jo ændret sig en Del i de tredsinstyve Aar, siden han var her. Det falder ham derfor en Del vanskeligt at orientere sig, naar han skal ud paa Besøg til gamle og ny Bekendte.

Omtrent alle de danske – Embedsmænd og andre – som har været paa Færøerne i de to sidste Menneskealdre, har nemlig stiftet personligt Bekendtskab med ham i deres eget Hjem eller paa andre Maader.

Den raske højst livlige gamle Mand er derfor stærkt optaget hver Dag.

## Ein Müller var eisini kapari

Hvørt ættarlið hevur havt sín ævintýrara. Ein pápabeiggi gamla H.C. Müller hevði tað ikki minni spennandi. Um hann kann verða sagt í stuttum:

Mikkjal Müller var føddur í 1785 í Hvalba, og hann doyði í 1849. Í 1807 fekk hann stýrimansprógv og undir sjey ára krígnum millum Ongland og Danmark førdi hann fleiri kaparaskip. Hann átti sjálvur eitt lítið far, einans trý tons til støddar, ið varð nevnt Røver Fienden, og sum hevði kanón og 10 manns umborð. Í 1808 fekk hann kaparaloyvi frá donskum myndugleikum.

Seinni var hann skipari á fleiri skipum, og uppgávan var at kapra fíggindaskip við tess vørum.

Mikkjal longdist tó aftur til Føroya og kom aftur í 1826. Hann fór tá at føra Thorshavn, sum gjørdist eitt farmaskip, ið sigldi við koli millum Havn og Hvalba. Teir fóru eisini at royna fiskiskap við snøri, men skipið var ikki egnað til hesa veiðu. Seinni fóru teir at royna eftir sild, og staðfest varð at sild var til. Pløyen amtmaður hevði stórar vónir til hesa veiðu, men hesar vónir vórðu tó ikki innfríaðar.

Mikkjal var eisini á øðrum økjum framburðsmaður. Saman við Jens Davidsen íbirtir hann í 1826 eitt lestrarfelag, sum var fyrsti spírin til landsbókasavnið.

Tað var eisini Mikkjal, sum bygdi part av tí gamla húsinum hjá Müller, sum er áfast við Trygd, og har tað enntá hevur verið løgtingshús.

Mikkjal var ógiftur. Hann fekk tó eitt barn við einari arbeiðskonu hjá pápanum, men barnið doyði heilt skjótt og er helst saman við pápanum jarðað í gamla kirkjugarði.

**Komandi partur**
Í komandi parti fara vit at umrøða hjúnini Johannu og Johan Restorff, sonur gamla Restorff